# Spennandi størv
í Keypssamtøkuni
í Dr. Jakobsensgøtu

***Vit sóknast eftir fólkum til handil okkara:***

## Varaleiðara

**Vit kunnu bjóða tær:**
… eitt spennandi starv, har tú fært høvi til at vísa tíni evnir og hugflog,
… ein handil, við góðum rakstri og nógvum spennandi møguleikum,
… eitt gott og lívligt arbeiðsumhvørvi,
… løn eftir avtalu og ml.a. førleika.

**Vit vænta okkum av tær:**
… kanst hava ábyrgd av at handilin altíð er til reiðar at taka ímóti kundum,
… kanst standa á odda og menna starvsfólkaliðið í handlinum,
… kanst skipa fyri góðari kundarøkt,
… dámar at taka av avbjóðingum og hava nógv at gera,
… sjálvstøðug/ur, ábyrgdarfull/ur og kanst skifta millum arbeiðsuppgávurnar í handlinum,
… hevur kunnleika til handilsyrkið.

## Starvstfólk til Frukt- og grønmetisdeildina og Blómudeildina

**Vit kunnu bjóða tær:**
… eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
… eina deild í framhaldandi vøkstri og allatíðina við nýggjum avbjóðingum og broytingum
… eitt gott og lívligt arbeiðsumhvørvi
… góða løn eftir avtalu og førleika

**Vit vænta okkum av tær:**
… at tú kanst arbeiðs sjálvstøðugt við fjølbroyttum hugflogi
… at tú kanst arbeiða bæði innan- og uttandura
… at tú framhaldandi kanst skapa eina spennandi, tiltalandi, nøktandi og kundavinarliga deild, sum í dag hevur sera gott orð á sær.

**…og meira um bæði størvini:**
**Setan:** Skjótast gjørligt eftir avtalu
**Løn:** Sambært avtalu.

Meira fæst at vita um størvini, við at støkka inn á gólvið ella ringja á tlf. 311320 ella 217593 og fáa eitt prát við leiðarin **Bo Møller**.

Skrivlig umsókn saman við viðkomandi skjølum, skal vera okkum í hendi innan **12. september 2002** og skal stílast til:

**FK-Tórshavn**
Att.: Bo Møller
Dr. Jakobsensgøta 6 · Boks 349
110 Tórshavn

**KEYPSAMTØKAN**
**Dr. Jakobsensgøta**


# Svimjihylurin í Leirvík

Frá 02. september 2002 er svimjihylurin í Leirvík opin hesar tíðir:

| | Børn | Foreldur við børnum | Vaksin | Útleigan |
|---|---|---|---|---|
| Mánadag er stongt | | | | |
| Týsdag | 17.00-18.00 | | 18.00-21.00 | |
| Mikudag | | | | 18.00-21.00 |
| Hósdag er stongt | | | | |
| Fríggjadag | 17.00-18.00 | | 18.00-21.00 | |
| Leygardag | 14.00-16.00 | 16.00-18.00 | 18.00-19.00 | |

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42
520 Leirvík · Tlf. 443006 · Fax 443374


www.sosialurin.fo



Heystið 2002

# Fermingartilboð
- út úr húsinum



*Forrættir*
· Fesk súpan við bollum, borðreidd við breyði
· Aspargessúpan, borðreidd við breyði
· Rækjubland við breyði og smøri

*Høvuðsrættir*
· Lambasteik við reyðkáli, agurkusalati, súltutoyi, hvítum eplum og sós av soðnum
· Lambasteik við rómabakaðum eplum, salati og sós av soðnum
· Heilstokt oksafilet við grønmeti, agurkusalati, hvítum eplum og sós av soðnum
· Heilstokt oksafilet við rómabakaðum eplum, salati og sós av soðnum.
· Fleskasteik við reyðkáli, agurkusalati, hvítum og brúnkaðum eplum og sós av soðnum

*Omaná*
· Trifli
· Fromasja: Appelsin, jarðber ella ananas
· Íslagkøka við vaflum



*Út úr húsinum-prísir:*
*2 verðar* 125,-
*3 verðar* 150,-




HOTEL
Tórshavnar Sjómansheim
TÓRSHAVN
★★★

Tórsgøta 4 • P.O. Box 97 • FO-110 Tórshavn
Tel +298 350 000 • Fax +298 350 001
e-mail: hotel@post.olivant.fo


Broytingar

# Skálafjarðarleiðin

**Vegna umvælingar umborð á Rituni, fer Ternan I at røkja Nólsoyarleiðina.**

**Tí verður eingin sigling á Skálafjarðarleiðini frá 2. sept. til og við 6. sept.**

## Snarbussar verða settir inn, sí niðanfyri

Kl. 06:25 av Toftum (í Skálabotni kl. 06:45)
Kl. 06:45 úr Skálabotni (í Tórshavn kl.07:40)

Kl. 16.20 úr Tórshavn (í Skálabotni kl. 17:10)
Kl. 17.10 úr Skálabotni (á Toftum kl. 17.30)

Upplýsingar um ferðaætlanina fáast á rutuupplýsingini á tlf. 34 30 30.

Víst verður eisini til heimasíðu okkara á www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS


Sosialurin -tað loysir seg




# Starv sum havnaumsjónarmaður við Fuglafjarðar havn

Starv sum havnaumsjónarmaður við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst til setan tann **01. oktober 2002** ella so skjótt sum til ber.

**Krøv:** Útbúgving sum navigatørur somuleiðis sum góður kunnleiki til enskt er ein treyt.

Lønar- og arbeiðstreytir verða sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Føroya Skipara- & Navigatørfelag.

Starvið verður lønt sambært lønartalvuni fyri havnaumsjónarmenn.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristian Oluf Christiansen, havnameistara á telefon 444054 ella til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 444006 lokal 11.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

Møguligar umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu verða **Fuglafjarðar kommunu** í hendi í seinasta lagi **mikudagin 18. september 2002 kl. 16.00.**

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir ella eisini onga at taka.

Fuglafjørður, tann 28. august 2002
**Fuglafjarðar býráð**


# Sky digital
og Orbit Network.

prísur 5.495,- avmarkað

Kort og móttakari, alt fæst nú á einum stað.

Kortsáttmála beinleiðis við Sky Digital.

Sjálvandi tann tryggasta loysnin.

Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tlf 421411 ella 215328




Fígging kann útvegast


# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akfaraskránna til setan so skjótt sum gjørligt. Talan er um eitt tíðaravmarkað starv, ið er skipað sum eitt 1/2 ársverk.

**Uppgávur:**
Landsstýrismaðurin í Vinnumálum fer ætlandi í næstum at áseta, at øll prutl skulu skrásetast. Í hesum sambandi verður søkt eftir fólki til hesa uppgávu. Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðsla av viðskiftafólki
- Framleiðslu og útflýggjan av nummarspjøldrum
- Eftirkanning av kravdum skjølum
- Kunning av viðskiftafólki um átakið

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi. Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**Setanartreytir:**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetananin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráðir.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosað við Jákup Jacobsen, stjóra. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 9. september 2002.

**BILEFTIRLIT FØROYA**
**Hoyvíksvegur 57**
**Postsmoga 3206**
**FO-110 Tórshavn**

*Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kunningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólko koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskrásetingina og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 18 fólk.*


# DAN-JOB

søger igen til flere Skisportshoteller friske unge piger som allround, køkken-, værelsesrengøring-kassedame, smørebrødsjomfru i Schweiz i vintersæsonen des. 02/apr. 03.

danjob@email.dk. www.danjob.dk.

**tlf./fax 004575711000/75711212**


# Ársveitsla

Landsfelag Pensjónistanna hevur ársveitslu í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn tann 14. september.

Nærri upplýsingar fáa tit frá tykkara egna lokalfelag.

Tilmelding til tykkara felag seinast 9. september.

**Nevndin**

# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Kommunusamskipan Føroya KSF til setan so skjótt sum gjørligt.

Skrivstovufólki skal saman við skrivara felagsins taka sær av felags áhugamálum hjá limakommununum í einum mennandi umhvørvi, har arbeiðsuppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar.

Kommunusamskipan Føroya KSF er ein tvørkommunalur felagsskapur við hesum limum: Klaksvíkar kommuna, Fuglafjarðar kommuna. Runavíkar kommuna, Skála kommuna, Tórshavnar kommuna, Kirkjubøar kommuna, Tvøroyrar kommuna og Vágs kommuna.
Av serligum áhugamálum í løtuni er uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, uppskot til umsitingarligar mannagongdir o.a.

**Kommunusamskipan Føroya KSF bjóðar:**
– eitt starv við nógvum og fjølbroyttum uppgávum, og í tøttum tilknýti við skrivara/samskipara felagsins:
– at gera kunningartilfar til kommunurnar
– luttøku í og skipan av tiltøkum o.ø. hjá limakommununum
– samskifti við landsumsitingina, áhugabólkar og aðrar interessantar hjá kommununum
– fyrireiking av fundum og øðrum aktivitetum
– í givnum førum at umboða felagið úteftir
– vanligt skrivtovuhald sum skráseting, roknskap, avgreiðslumál o.a.

**Kommunusamskipan Føroya roknar við at tú m.a.**
– hevur skrivstovuútbúgving ella aðra relevanta útbúgving
– hevur áhuga í kommunalum viðurskiftum
– hevur góð samstarvsevnir og er fyrikomandi
– hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt og er málsøkjandi
– hevur ávísan førleika at arbeiða við teldu

**Setanartreytir:**
Talan er um fulltíðarstarv og fevnir um virksemi hjá Kommunusamskipan Føroya KSF umframt Kommunala Arbeiðsgevarafelagið KA.
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið og verður sett skjótast til ber.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til skrivaran Kára Thorsteinsson tlf. 322180 og heima á tlf. 441501.

Umsóknin saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skal vera KSF í hendi í seinasta lagi 14. september 2002.
Umsóknin skal sendast til:

**Kommunusamskipan Føroya KSF**
Lucas Debesargøta 6-8
Postboks 1212
110 Tórshavn


ADC-Heilsølan
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

ARBEIÐSHANDSKAR
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA